RASMUSSEN & WEIHE
Statsautoriserað grannskoðarafelag P/F
An associated firm of PRICEWATERHOUSECOOPERS

A Glaðsheyggi
Box 30
FO-110 Tórshavn
Tlf (+298) 31 10 17
Fax (+298) 31 10 18
Reg. nr. 267
E-mail: rasmussen@rasmussen.fo
Http://www.rasmussen.fo

# Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin

## Ársroknskapur 2001
(10. roknskaparár)

## Avrit

# INNIHALDSYVIRLIT

| | Síða |
|---|---|
| Almennar upplýsingar | 2 |
| Roknskaparátekning | 2 |
| Ársfrágreiðing | 3 |
| Grannskoðanarátekning | 4 |
| Nýttur roknskaparháttur | 5 |
| Rakstrarroknskapur | 6 |
| Fíggjarstøða pr. 31. desember | 7 |
| Gjaldførisfrágreiðing | 8 |
| Notur til ársroknskapin | 9 |

## ALMENNAR UPPLÝSINGAR

**Stovnurin**

Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin
c/o Toll- og Skattstova Føroya, stýrið
Traðargøta 39
FO-160 Argir

**Stýrið**

Sigurd Poulsen, formaður
Jógvan Vágsheyg, næstformaður
Gunnvør Dam Jensen
Jenny Lydersen

**Grannskoðan**

**Rasmussen & Weihe P/F**
Statsaut. grannskoðarafelag

## ROKNSKAPARÁTEKNING

Ársroknskapurin verður lagdur fyri stýrisfundin við tilmæli um góðkenning.

Tórshavn, hin 21. mars 2002

Stýrið:

| | |
|---|---|
| Sigurd Poulsen, formaður | Jógvan Vágsheyg, næstformaður |
| Gunnvør Dam Jensen | Jenny Lydersen |

Roknskapurin er góðkendur á stýrisfundi hin / - 2002

Fundarstjóri

# ÁRSFRÁGREIÐING

## Virksemi

Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin er settur á stovn við løgtingslóg nr. 39 frá 7. mai 1991 við seinni broytingum.

Grunnurin hevur til endamáls at tryggja øllum íbúgvum landsins eina arbeiðsmarknaðareftirløn.

Fæ grunsins verður fingið til vega við at allir persónar undir 67 ár rinda grunninum ½ % av teirra árligu skattskyldugu inntøku og allir arbeiðsgevarar rinda ½ % av útgoldnu A-inntøkunum.

Stovnurin fór undir regluligar útgjaldingar til persónar yvir 67 tann 1. apríl 1997.

## Inntøkuviðurskifti

Á hvørjum ári skal ein endalig uppgerð gerast fyri at kanna eftir, um grunnurin hevur fingið tað inngjald hesin eigur sambært lógina ella um nakað skal endurrindast til tey, sum hava goldið inn. Eingin slík uppgerð er gjørd fyri 2001, men ætlanin er at gera hesa uppgerð seinni í 2002.

Stýrið metir, at henda óvissa ikki er av eini tílíkari støðd, at henda hevur týðandi ávirkan á roknskapin, og tí er ársroknskapurin uppsettur, uttan at henda endaliga uppgerð er gjørd.

## Fíggjarlig lýsing

Í mun til undanfarna ár er inngjaldið frá løntakarum og arbeiðsgevarum hækkað við tkr. 3.738, frá tkr. 50.895 í 2000 til tkr. 54.633 í 2001.

Útgjaldingin av arbeiðsmarknaðareftirlønum var tkr. 41.598 fyri alt árið 2001 í mun til tkr. 39.533 fyri 2000.

Avsetingar og tap uppá skuldarar vaks frá tkr. 188 í 2000 til tkr. 516 í 2001.

Úrslitið áðrenn fíggjarligar postar og óvanligar inntøkur gjørdist í 2001 ein vinningur uppá tkr. 11.341 ímóti einum vinningi uppá tkr. 10.357 í 2000.

Fíggjarligu postarnir í 2001 vóru tkr. -509 ímóti tkr. 13.844 í 2000 og stavar hetta fall m.a. frá, at grunnurin hevur havt eitt stórt óstaðfest tap uppá partabrøv.

Íløgan í lánsbrøv og partabrøv pr. 31.12.2001 er á sama støði sum pr. 31.12.2000.

## Úrslit

Ársúrslitið í 2001 gjørdist eitt avlop uppá tkr. 10.833 ímóti einum avlopi uppá tkr. 24.201 fyri 2000.

Eftir hetta verður eginogn grunsins pr. 31. desember 2001 tkr. 263.353.

## Hendingar eftir roknskaparlok

Einki er hent eftir roknskaparlok, ið hevur serligan týdning fyri metingina av ársroknskapinum.

## Framtíðin

Mánaðarliga upphæddin, sum var útgoldin sum arbeiðsmarknaðareftirløn, var í 2001 kr. 620. Gjaldið fyri 2002 er sett til kr. 650 pr. mánaða.

Stýrið metir, at við núverandi inngjaldingarhátti, kann roknast við, at útgjaldingin í ár 2005 verður uppá kr. 725 pr. mánaða.

Umframt gongdina í búskapinum, hevur eitt vaksandi tal av eftirlønarmóttakarum ávirkan á útgjaldingina.

## Ognarviðurskifti

Grunnurin er ein sjálvseigandi stovnur.

Sambært lógini fyri grunnin verður valt eitt stýri at sita fyri grunninum. Hetta stýrið, sum skal hava 4 limir og sum verður valt fyri eitt 3 ára skeið, verður valt soleiðis: Ein limur umboðandi arbeiðsgevarar, ein umboðandi løntakarar, ein umboðandi Tryggingarfelagið Føroyar og stjórin í Landsbanka Føroya.

Landsstýrið tilnevnir formannin í stýrinum

# GRANNSKOÐANARÁTEKNING

Vit hava grannskoðað ársroknskapin, greiddur av leiðsluni, fyri Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin fyri árið 2001.

**Um grannskoðanina**
Í samsvar við alment viðurkendar grannskoðanarreglur er granskoðanin skipað og framd við tí endamáli at fáa eina grundaða sannføring um, at tað ikki eru týðandi feilir ella vanta týðandi upplýsingar í roknskapinum. Undir grannskoðanini hava vit, eftir meting um týdning og risiko, kannað grundarlag og prógv fyri upphæddum og øðrum upplýsingum í roknskapinum. Vit hava samstundis tikið støðu til roknskaparháttin og roknskaparligu metingarnar, sum leiðslan hevur gjørt, eins og vit hava mett, um upplýsingarnir í roknskapinum sum heild eru nøktandi.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

**Niðurstøða**
Tað er okkara fatan, at ársroknskapruin er greiddur í samsvari við roknskaparkrøv í lóggávuni, og at hann gevur eina rættvísandi mynd av grunnsins ogn og skuld, fíggjarligu støðu og úrsliti.

Tórshavn, hin 21. mars 2002

**Rasmussen & Weihe P/F**
Statsaut. grannskoðarafelag

| | |
|---|---|
| Klaus Rasmussen<br>statsaut. revisor | Joen Magnus Lamhauge<br>reg. revisor |

# NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR

## Alment

Roknskapurin er greiddur í samsvar við góðan roknskaparsið.

Grunnurin er ikki bundin av at gera roknskap í tráð við ársroknskaparlógina, men roknskapurin er gjørdur sambært meginreglunum í ársroknskaparlógini.

Nýtti roknskaparhátturin er í høvuðsheitum hesin:

## Inntøkur

Inntøka grunnsins – arbeiðsmarkn.eftirlønargjaldið – er fyri løntakarar gjørt upp sum ½ % av skattskyldugu inntøkuni fyri 2001 sambært fyribilsskattaskrásetingini.

Fyri arbeiðsgevarar er arbeiðsmarkn.eftirlønargjaldið gjørt upp sum ½ % av útgoldnu A-inntøkuni fyri 2001.

## Áogn

Skuldarar eru virðisásettir við frádrátti av møguligum tapsvand, grundað á eina meting av hvørjum einstøkum skuldara.

## Lánsbrøv og partabrøv

Lánsbrøv og partabrøv eru upptikin til kursvirðið ultimo í árinum.

## Tíðaravmarkingar, áogn

Upphæddin umfatar útreiðslur í árinum, sum viðvíkja næsta árinum.

## Skattur

Grunnurin hevur, vísandi til løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum, ikki skattskyldu.

# RAKSTRARROKNSKAPUR

| | Nota | 2001 | *2000* |
|---|---|---|---|
| | | | *(t.kr.)* |
| Nettoinntøka | 1 | 54.633.305 | *50.895* |
| Útgoldin arbeiðsmarknaðareftirløn | | -41.597.540 | *-39.533* |
| Aðrar útreiðslur | | -1.178.543 | *-817* |
| Avsetingar og tap uppá skuldarar | 2 | -516.071 | *-188* |
| | | **11.341.151** | ***10.357*** |
| Staðfestur kursvinningur/tap og vinningsbýti | 3 | 2.581.648 | *7.077* |
| Ikki staðfestur kursvinningur/tap | 4 | -14.886.809 | *-1.889* |
| Rentuinntøkur | 5 | 11.796.639 | *8.656* |
| | | **-508.522** | ***13.844*** |
| **Ársúrslit** | | **10.832.629** | ***24.201*** |

# FÍGGJARSTØÐA PR. 31. DESEMBER

| | Nota | 2001 | *2000* (t.kr.) |
|---|---|---|---|
| **AKTIV** | | | |
| Áogn | 6 | 30.031.644 | *28.155* |
| Lánsbrøv og partabrøv | | 194.077.737 | *192.713* |
| Tøkur peningur | | 36.324.775 | *28.421* |
| Umferðarfæ íalt | | **260.434.156** | *249.289* |
| Tíðaravmarking | | **3.664.400** | *3.455* |
| AKTIV ÍALT | | **264.098.556** | *252.744* |
| **PASSIV** | | | |
| **Eginogn** | 7 | **263.352.608** | *252.520* |
| Ov nógv innkravd arbeiðsmarknaðargjøld | | 204.401 | *205* |
| Onnur skuld | 8 | 541.547 | *19* |
| **Skuld íalt** | | **745.948** | *224* |
| **PASSIV ÍALT** | | **264.098.556** | *252.744* |
| Møguligar skyldur | 9 | | |

# GJALDFØRISFRÁGREIÐING FYRI 2001

| | |
|---|---|
| Ársúrslit 2001 | 10.832.629 |
| | |
| Broytingar í ogn og skuld grunnsins: | |
| Arbeiðsmarknaðareftirlønargjald fyri 2000 og áður (arb. gevarar) | -28.348 |
| Arbeiðsmarknaðareftirlønargjald fyri 2001 (arb. gevarar) | -3.068.198 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld, løntakarar | 1.216.116 |
| Onnur áogn | 3.889 |
| Tíðaravmarkingar | -209.835 |
| Ov nógv innkravt arbeiðsmarknaðargjald | -841 |
| Onnur skuld | 522.743 |
| | |
| Gjaldførisúrslit fyri 2001 | 9.268.155 |
| Gjaldførið pr. 1. januar 2001 | 221.134.357 |
| | |
| Gjaldførið pr. 31. desember 2001 | **230.402.512** |

**Sundurgreining av gjaldføri:**

| | |
|---|---|
| Lánsbrøv og partabrøv | 194.077.737 |
| Tøkur peningur | 36.324.775 |
| | **230.402.512** |

# NOTUR TIL ÁRSROKNSKAPIN

| | 2001 | 2000 (t.kr.) |
|---|---|---|
| **1. Nettoinntøka** | | |
| Arbeiðsmarknaðareftirlønargjald, løntakarar | 28.008.073 | *27.342* |
| Arbeiðsmarknaðareftirlønargjald, arbeiðsgevarar | 26.625.232 | *23.553* |
| **Nettoinntøka íalt** | **54.633.305** | ***50.895*** |

Nettoinntøkan – arbeiðsmarknaðareftirlønargjaldið – er fyri løntakarar gjørt upp sum ½ % av skattskyldugu inntøkuni fyri 2001 sambært fyribilsskattaskrásetingini. Fyri arbeiðsgevarar er arbeiðsmarknaðareftirlønargjaldið gjørt upp sum ½ % av útgoldnu A-inntøkuni fyri 2001.

| | 2001 | 2000 (t.kr.) |
|---|---|---|
| **2. Avsetingar og tap uppá skuldarar** | | |
| Minking í avseting móti tapi uppá skuldarar, arbeiðsgevarar | 0 | *224* |
| Avskrivað krav um arbeiðsmarknaðareftirlønargjald, arbeiðsgev. | -507.061 | *-394* |
| Avskrivað renta, arbeiðsgevarar | -9.010 | *-18* |
| **Avsetingar og tap uppá skuldarar íalt** | **-516.071** | ***-188*** |

| | 2001 | 2000 (t.kr.) |
|---|---|---|
| **3. Staðfestur kursvinningur/tap og vinningsbýti** | | |
| Vinningsbýti partabrøv | 1.284.052 | *426* |
| Staðfestur kursvinningur/tap partabrøv | 105.798 | *7.263* |
| Staðfestur kursvinningur/tap lánsbrøv | 1.191.798 | *-612* |
| **Staðfestur kursvinningur/tap og vinningsbýti íalt** | **2.581.648** | ***7.077*** |

| | 2001 | 2000 (t.kr.) |
|---|---|---|
| **4. Ikki staðfestur kursvinningur/tap** | | |
| Ikki staðfestur kursvinningur/tap partabrøv | -13.849.602 | *-2.039* |
| Ikki staðfestur kursvinningur/tap lánsbrøv | -1.037.207 | *150* |
| **Ikki staðfestur kursvinningur/tap íalt** | **-14.886.809** | ***-1.889*** |

| | 2001 | 2000 (t.kr.) |
|---|---|---|
| **5. Rentuinntøka** | | |
| Renta av arbeiðsmarknaðareftirlønargjaldi, arbeiðsgevarar | 225.355 | *180* |
| Renta av lánsbrøvum | 9.795.097 | *4.831* |
| Renta av innistandandi | 1.776.187 | *3.645* |
| **Rentuinntøka íalt** | **11.796.639** | ***8.656*** |

| | 2001 | 2000 (t.kr.) |
|---|---|---|
| **6. Áogn** | | |
| AM-gjald fyri 2000 og áður (arb.gev.) | 137.363 | *109* |
| AM-gjald fyri 2001 (arb.gev.) | 26.619.941 | *23.552* |
| AM-gjøld, løntakarar | 655.172 | *1.879* |
| AM-gjøld løntakarar desember 2001, goldið í januar 2002 | 2.619.168 | *2.611* |
| Onnur áogn | 0 | *4* |
| **Áogn íalt** | **30.031.644** | ***28.155*** |

# NOTUR TIL ÁRSROKNSKAPIN

| | 2001 | 2000 (t.kr.) |
|---|---|---|
| **7. Eginogn** | | |
| Eginogn primo | 252.519.979 | *228.319* |
| Flutt úrslit | 10.832.629 | *24.201* |
| **Eginogn ultimo** | **263.352.608** | ***252.520*** |

| | | |
|---|---|---|
| **8. Onnur skuld** | | |
| Føroya Gjaldstova – ov nógv inngoldið | 25.978 | *19* |
| Grannskoðan | 67.500 | *0* |
| Toll- og Skattstova Føroya, (skrivstovuhald v.m.) | 327.524 | *0* |
| Landsbankin, umsiting av fíggjarognum 4. kvartal 2001 | 120.545 | *0* |
| **Onnur skuld íalt** | **541.547** | ***19*** |

**9. Møguligar aðrar skyldur**

Tað áhvíla ikki grunninum aðrar møguligar skyldur, herundir borgs- og ábyrgdarskyldur, enn tær, sum eru nevndar í roknskapinum.